# Viðareiðis Kommuna setir enn føtur í spenni

**Skúlin á Viðareiði virkar ikki til fulnar, tí kommunan vil ikki betala 2.600 krónur til savnsrøkt.**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*


*– Hetta kann ikki vera ein spurningur um pening, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*

**Viðareiði:** Skúlin á Viðareiði er ikki sum hon skal vera í løtuni.

Tað er framvegis tann nógv umstrídda savnsrøktin, sum spøkir.

Føroya Kommunufelag tók fyri jól undir við semjuni um savnsrøktina á skúlunum.

Men kortini vil Viðareiðis Kommuna ikki gjalda fyri savnsrøktina og tí liggur hesin parturin av undirvísingini lamin á Viðareiði.

Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, sigur, at felagið hevur blokerað savnsrøktina á Viðareiði og hevur noktað lærarunum at røkja søvnini, eitt nú st keypa tilfar, sum skal brúkast til tær handaligu lærugreinarnar.

Eftir avtaluni um savnsrøkt, skal ábyrgdarfólk setast at hava ábyrgdina av søvnunum. Síðani skulu Mentamálaráðið og kommunurnar betala hvør sína helvt av tí, sum savnsrøktin kostar. Hvussu stór upphæddin er, veldst um næmingatalið.

Men hetta er bara galdandi til 1 august í ár, tá ið Mentamálaráðið átekur sær allar útreiðslurnar, tí tá kemur avtalan um arbeiðstíð í gildi.

Eftir henni skal lærari setast at røkja søvnini. Tímarnar, hann brúkar til tað, verða síðani drignir frá vanligu tímatalvuni.

### Smáligt

Elsa Birgitta P. Petersen heldur, at hetta er ómetaliga smáligt av Viðareiðis Kommunu, tí tað eru smápengar, tað snýr seg um.

– Tilsamans hevði hetta kostað Viðareiðis kommunu 2.600 krónur, tað er alt. Men tað vil hon ikki betala og tí eru handaligu lærugreinarnar í skúlanum rættiliga nógv skerdar og skúlin virkar ikki til fulnar.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag sigur, at hetta kann ikki vera ein spurningur um pening.

– Hetta er ein spurningur um negativan hugburð mótvegis skúlanum.

– Men niðurstøðan er, at kommununan forðar skúlanum eftir lógini og tað átti at verið hugvekjandi hjá landsins myndugleikum, heldur hon.

Tað, hon sipar til, er, at eftir lógini skulu næmingarnir hava undirvísing í handaligum lærugreinum, men tað er onki av á Viðareiði

So vítt hon veit, er Viðareiðis nú einasta kommuna í landinum, sum enn setir føtur í spenni og ikki vil betala fyri savnsrøktina.

Hetta hevur annars verið eitt mál, sum tað hevur tikið nøkur ár at loysa. Men fyrst varð avtala gjørd við tær stóru kommunurnar í Býarsamskipan Føroya, men tað var ikki fyrrenn beint fyri jól, at tað eydnaðist at fáa avtalu í lag við tær smærru kommunurnar, sum eru í Kommunufelag Føroya.

Men sum borgarstjórin á Viðareiði sigur aðrastaðni í blaðnum, er tað eitt prinsippmál hjá kommununi, at hon vil ikki betala.

## Royna at turka útreiðslur upp í okkum

**– Tað er ikki uppgávan hjá kommununi at betala læraralønir, sigur Jógvan Nybo, borgarstjóri á Viðareiði**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*

**Viðareiði:** Tað er eitt prinsippmál, at Viðareiðis Kommuna ikki vil betala fyri savnsrøktina á skúlanum.

Tað sigur Jógvan Nybo, borgarstjóri.

Sum sagt í aðrari grein her í blaðnum, vil Viðareiðis Kommuna ikki betala 2.600 krónur til savnsrøktina og tíansheldur er undirvísingin í skúlanum skerd.

Men hetta er ikki av tilvild, sigur borgarstjórin.

Hann sigur, at bygdaráðið hevði fund fyrr í árinum og har varð einmælt samtykt, at kommunan skal ikki betala fyri savnsrøktina.

– Vit halda, at tað er ikki ein kommunal uppgáva at betala læraralønir í fólkaskúlan um so tað gera vit ikki, hóast tað ikki eru tær stóru upphæddirnar, tað snýr seg um.

Hann sigur, at tað kann heldur ikki ganga at tað almenna alsamt roynir at sleppa sær undan fleiri og fleiri útreiðslum og at leggja tær yvir á kommunurnar, samstundis sum peningur ikki fylgir við, tí kommunurnar fáa ikki størri part av kommunuskattinum, hóast tær fáa fleiri útreiðslur.

Men tað er upplýst at hetta bert skal vera galdandi til í august í ár, tá ið Mentamálaráðið skal átaka sær allar útreiðslurnar?

– Tað vita vit onki um. Tað einasta vit vita, er, at Mentamálaráðið hevur boðað frá, at ætlanin er at yvirtaka útreiðslurnar í august. Men mongum brestur ætlan, tað hava vit sæð so ofta og vit hava onga trygd fyri at tað hendir, sigur Jògvan Nybo.


*Skúlin av Viðareið virkar ikki til fulnar, men tað er eitt prinsippmál, at kommunan ikki vil betala, sigur borgarstjórin*

## Synd at Jørgen Niclasen skuldi fara ígjøgnum hatta

**Stríðið í samgonguni man fara at javna seg, heldur Jenis av Rana**

MISÁLIT
*Áki Bertholdsen*

– Tað var synd í Jørgen Niclasen, at hann hann ikki varð spardur fyri hatta upplivilsi.

Jenis av Rana, sum er ein av teimum smáu flokkunum í samgonguni, heldur framvegis, at tað var rætt, at Jørgen Niclasen fór frá.

Men hann harmast um, at hann ikki fór frá áðrenn, so at hann varð spardur fyri at skula sita í Løgtinginum og verða kroystur frá alment, tí tað skerst ikki burtur, at tað var ein kensluborin løta hjá fyrrverandi landsstýrismanninum og tað sást eisini á honum.

– Hetta var ein keðilig viðgerð, sum Jørgen Niclasen átti at verðið spardur fyri.

Jenis av Rana sigur, at hann staðiliga heitti á Jørgen Niclasen um at fara frá áðrenn tað kom so langt, men tíverri vildi hann ikki tað og tí endaði tað, sum tað gjørdi, men tað var óneyðugt.


*Tónalagið verður kanska harðari, men eg vænti at samgongan fer at halda, sigur Jenis av Rana*

### Annað slag av kanningum

Annars heldur hann, at eftir hetta málið er tíðin komin at hetta slagið av kanningum verður endurskoðað.

– Løgtingið er landsins hægsta vald. Og eg haldi, at tá ið Løgtingið biðjur um eina serfrøðingakanning, eiga vit eisini at føla tað sum okkara skyldu at halda okkum til úrslitið. Vit kunnu ikki seta eina slíka kanning í verk uttan at vit frammanundan hava gjørt okkum greitt, at vit ætla at brúka úrslitið, tí tær kosta hóast alt fleiri hundrað túsund krónur, í hesum føri 300.000 krónur.

– Tá ið ein slík kanning er gjørd, ber ikki til at skúgva hana til viks aftaná, tí at Løgmaður ger eina aðra kanning. Og vit eiga at minnast til, at tað er Løgtingið, sum hevur eftirlit við Landsstýrinum. Tað er ikki landsstýrið sum hevur eftirlit við sær sjálvum.

– Men í hesum føri varð spurnartekin sett við kanningina og tað eigur at fáa okkum at umhugsa hetta slagi av kanningum.

– Vit eiga at fáa eitt ella annað slag av kanningarhátti, sum kann javntsetast við Løgtingsins umboðsmann. Hetta er kanska ov stór uppgáva hjá einum »tilvildarligum« løgfrøðingi og tí eiga vit at finna onkran annan máta. Umboðsmaðurin hevur eina umsiting og tað eiga løgfrøðingar, ið gera slíkar kanningar, kanska eisini at hava.

### Fer at javna seg

Annars ivast Jenis av Rana ikki í, at hetta fer at javna seg og at samgonguni er lív lagað, hóast bæði miðflokkurin og tjóðveldisflokkurin kravdu Jørgen Niclasen frá.

– Fólkaflokkurin royndi at verja teirra landsstýrismann til tað síðsta og tað mugu teir hava loyvi til. Men eg vænti, at hetta fer at laga seg, tí tað kann ikki vera so, at landsstýrismenn eru friðhalgaðir.

Hann væntar, at fólkaflokkurin fer at leggja sær hendingina týsdagin í geyma og so heldur samstarvið í samgonguni fram, tó at tónalagið kanska verður eitt sindur harðari.

– Samgongan hevur ein greiðan politikk og ein greiðan málsetning og tað vænti eg, at vit fara at halda fast við, tí eg dugi ikki at síggja aðrar samgongumøguleikar, sigur Jenis av Rana



# Borgarliga skrásetingin er ein tænasta

**– At fara at leggja borgarligu skrásetingina yvir á Fólkayvirlitið er tað sama, sum at byrja at tøma kirkjuna fyri virksemi. Hon hevur havt hesa skráseting um hendi í eini 2 - 300 ár, og er tað ein ríkur siður, sum kirkjan eigur at halda fram við**

FÓLKAKIRKJAN
*Solby A. Eliasen*


*Heri Joensen, sóknarprestur, heldur ikki, at tíðin er farin frá kirkjubókunum*

Orðini eigur Heri Joensen, sóknarprestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi. Hann er ikki samdur við Niel Paula Danielsen, sóknarpresti í Norðoya vestara prestagjaldi, tá hesin sigur ,at tíðin er farin frá, at borgarliga skrásetingin verður umsitin av kirkjuni. Heri Joensen heldur, at tað er ein ríkur siður hjá fólkakirkjuni, og ein góður háttur at koma í samband við fólk.

Prestur sigur, at ein kirkja er ein kirkja, sum skal boða Guds orð, men hon skal eisini, soleiðis, sum tíðirnar eru í dag, vera ein tænastustovnur.

Hann greiðir frá, at tænastan, sum fylgir við tí, at borgarliga skrásetingin er undir kirkjuni, er tann bíligasta og best gjørda í landinum. Og sigast má, at tænastustøðið er høgt, tí tað, so gott sum, til eina og hvørja tíð er gjørligt hjá fólki at kunna fáa fatur á skjølum, sum teimum tørvar. Tí hóast skrivstovutíð, so ber altíð til at fáa fatur á presti, sum kann útvega tílík skjøl.

– Og tað er nakað, sum ikki fer at verða so lætt, um skrásetingin fer yvir til Fólkayvirlitið, sigur Heri Joensen, sum tó eisini viðgongur, at nógv arbeiði stendst av at umsita kirkjubøkurnar.

– Nógvar navnabroytingar eru, sera nógvar og mangt, mangt annað eisini, men hví skulu vit fara at oyðileggja tann týdningin, sum kirkjan hevur fyri samfelagið við at flyta skrásetingina til ein annan stovn at umsita, spyr presturin í størstu sóknini í landinum. Hann er sannførdur um, at ein tílík broyting hevði ikki verðið framd til tað besta fyri kirkjuna.

### Navnalóggávan ikki góð

Men samstundis ásannar prestur, at tað er nógv eykaarbeiði av hesum – serliga eftir at løgtingið samtykti broytingarnar í navnalóggávuni í fjør.

– Navnalóggávan var fín, áðrenn hon varð broytt í fjør, sigur prestur, sum eisini heldur, at nýggju broytingarnar hava havt við sær, at øll eru ikki líka yvir fyri lógini.

Hann vísir á, at í dag kann tað lata seg gera at uppkalla eitt barn eftir abbanum við stavseting, sum ikki samsvarar við tað føroyska málið. Hann nevnir eitt dømi, at um nú tvær mammur koma við hvør sínum soni, og onnur ynskir, at hann skal eita Finn, sum ikki samvarar við føroyskt, eftir abbanum, so kann hon tað. Men um hin sigur, at hon eisini ynskir at kalla sín son Finn, tí henni dámar navnið, men hevur ongan abba at kalla hann uppeftir, so sleppur hon tað ikki. Sonurin má tá eita Finnur.

– Hetta er jú púra burturvið, og ongin skilagóð frágreiðing finst onnur enn hon, at hitt barnið hevur ella hevði ein abba, sum stavaðist so. Eg haldi, at øll eiga at vera líka fyri lógini, men tað er ikki galdandi her. Navnalóggávan var góð, sum hon var áðrenn samtyktirnar í fjør, sigur Heri Joensen, sum heldur, at tað var betur, um ongin navnalóggáva var í dag, tí so kundu øll kalla teirra barn, tað tey ynskja og harvið verða líka fyri lógini.

Heri Joensen leggur at enda afturat, at onki er fullkomið her í verð, og tað er skipanin við kirkjubókunum heldur ikki, men hon er góð, sum hon er. Og hann hevur onki ynski um, at hon verður løgd til Fólkayvirlitið at umsita.

# Tíðin ikki búgvin enn

**Dómsprósturin Bjarni Bæk heldur ikki, at tíðin er komin til at fara frá borgarligu skrásetingini í fólkakirkjuni**

FÓLKAKIRKJAN
*Solby A. Eliasen*

Dómsprósturin vísir á, at talan er um eina grundskráseting, har øll, sum verða fødd verða skrásett. Og tá tey fáa navn, antin við dópi ella navngivin verða tey skrásett og síðani aftur við deyðsfall.

– Og hóast ein tók og flutti ta skrásetingina, so skulu allar handlingar í kirkjuni jú skrásetast kortini, so kirkjan hevði skulað havt eina ella aðra mannagongd fyri tað. Hvør hon so skuldi verðið, tað dugi eg ikki at siga. Og tí tað hevur jú heldur ongantíð verið uppi og vent, sigur Bjarni Bæk. Hann heldur eisini, at tað hevði verðið óneyðuga dýrt at flutt skrásetingina og fingið hana á sama informatiónsstøðið og tænastustøðið, sum hon er á í dag.

– Kirkjuliga skrásetingin er góð, sum hon er, og tíðin er ikki farin frá henni, sigur dómsprósturin í stuttari viðmerking til tað, sum Niels Pauli Danielsen førdi fram í Sosialinum í síðstu viku. Frá Landsfólkayvirlitinum varð sagt, at tey gjørdu ikki nakra viðmerking til eitt mál, sum ikki hevur verið viðgjørt.


*Bjarni Bæk, dómspróstur, heldur, at kirkjuliga skrásetingin er góð, sum hon er*

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu

Citroen Saxo 1,5D 3h
grønur, km 120.000 Jul'97
80.000,-

Citroen ZX 1,9TD 5h
grønur, km 163.000 Mai'97
85.000,-

Peugeot 405 2.0i stc
reyður, km 87.000 Jun'95
90.000,-

Citroen Xsara 1.9 td week.
gráur, km 77.000 Okt'98
115.000,-

Suzuki Baleno 1.3i
gráur, km 27.500 Apr'00
108.000,-

Citroen AX 1.1i 3h
met. bláur, km 85.000 Mars'96
25.000,-

Chrystler Voyager 2,4i
met. reyður, km 82.000 1995
115.000,-

Toyota Corolla 1,3i
svartur, km 24.000 Feb'02
103.000,-

VØRUVOGNAR

Citroen Jumper 2,5TD
reyður, km 120.000 1996
120.000,-

Nissan Serena 2,3D
bláur, km 88.000 Mai'97
92.000,-

Citroen Berlingo 1,9d
gráur, km 58.000 Okt'99
89.000,-

Nissan Serena 2,3D
bláur, km 102.000 Mai'97
92.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

www.sosialurin.fo